# Fróðskaparsetur Føroya

11. juni 2004

## Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 8/2004

Tíð: Hósdagin 10. juni 2004, kl. 14 – 15.45

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi:
Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 7/2004 setursráðsfundi 28. mai 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlógaruppskot 2005.** (J.nr. 0015-01365). *Fundarskjal: Brævfrá Mentamálaráðnum, dagfest 7. juni 2004, 1 s.* AS greiddi frá fráboðaða karminum, sum fyribils er ásettur. Nærri boð koma seinni í mánaðinum. Sambært framrokningunum er lønartørvurin til verandi virksemi nakað lægri enn loyvdi karmurin, meðan rakstrartørvurin er væl størri enn karmurin. Setursráðið samt um at halda fast við prinsippið um 80/20 býtið millum løn og rakstur, og søkt verður tí samsvarandi hesum. AS ger uppskot til umsókn, dagførdan tekst og skriv um fíggjartørvin til størvini í nýggju menningarætlanini. Tilfarið verður sent setursráðnum til kunningar so hvørt tað er liðugt. Alt tilfarið skal verða liðugt til góðkenningar á setursráðsfundi, sum verður 24. juni kl. 9. Uppskotið skal leggjast fyri til kunningar á samstarvsnevndarfundi 25. juni kl. 10.

4. **Mannagongd fyri fíggjarætlan, býti og stýring.** (J.nr. 0015-01377). *Fundarskjal: Uppskot frá Setursskrivstovuni, dagfest 24. mai, 2 s.* Uppskotið umrøtt. Einmælt samtykt.

5. **Námsskipanir á Føroyamálsdeildini.** (J.nr. 0041-01367). *Fundarskjal:Námsskipan, góðkend á megindeildarráðsfundi 8. juni 2004 27 s.* Staðfest. SSS sendir góðkendu námsskipanina til Mentamálaráðið til kunningar.

**6.** **Námsskipanir á Søgu- og Samfelagsdeildini.** (J.nr. 0042-01380). *Fundarskjal:Námsskipanir fyri søgu og stjórnmálafrøði, góðkendar á megindeildarráðsfundi 7. juni 2004, 7 og 6 s.* JPJ helt at onkrar broytingar vóru neyðugar, so málið varð flutt til komandi setursráðsfund.

7. **Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 8.6.04.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 7.6.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

8. **Fundaætlan heyst 2004.** (J.nr. 0011-00421). Fundirnir vera: 2. september, 7. oktober, 4. november og 9. desember.

9. **Val av valnevnd til megindeildarvalini og rektaravalið í heyst.** (J.nr. 0011-01379). Valnevndin afturvald. Í nevndini eru Eyðfinn Magnussen, Turið Sigurðardóttir og Annika Sølvará.

10. **Tilmæli frá Náttúruvísindadeildini til setan av professara í jarðalisfrøði.** (J.nr. 0021-01293). *Fundarskjal: Tilmæli frá Náttúruvísindadeildini, dagfest 8. juni, 1 s.* Ein samd metingarnevnd metti Robert James Brown skikkaðan til professarastarvið. Setursráðið tók undir við tilmælinum at bjóða honum professarastarvið. Samtykt at bjóða Robert James Brown til Føroyar at kunna seg við umhvørvið, áðrenn hann tekur støðu til tilboðið. SSS og NVD avgreiða málið.

**Avgreiðslumál:**

**11.** **Staðfesting av setanar- og starvstreytum fyri adjungeraðar lektarar og professarar á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. 0020-01378). *Fundarskjal: Uppskot frá Setursskrivstovuni, dagfest 1. juni, 2 s.* Samtykt við smáum rættingum.

**12.** **Námsferðarstuðulin 2004. Umsóknarfreistin er 14. juni. Setursskrivstovan ger uppskot til býti, og rektarin góðkennir. At staðfesta.** (J.nr. 0071-01126). Staðfest.

**Kunningarmál:**

**13.** **Mánaðarjavni ultimo apríl 2004, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 5.325.700 kr. = 28,7% av játtanarkarmi uppá 18.558.000 kr.** (J.nr. 0015-01111).

**14.** **NorFA 2003, Nordisk Forskerutdanningsakademi, Oslo.**

**15.** **Ársroknskapur 2003, Tryggingarfelagið Føroyar.**

Frágreiðing: Annika Sølvará